LM-003/2023

Løgmálaráðið
Gongin 7
Postrúm 64
110 Tórshavn

Tórshavn 31. juli 2023

UMMÆLI AV UPPSKOT TIL BROYTING Í RÚSDREKKALÓGINI

Vísandi til tykkara teldupost við tilhoyrandi skrivum um uppskot til broytingar í rúsdrekkalógini sent til ummælis t. 22. juni 2023

Vit hava gjøgnumgingið uppskotið og hava hesar viðmerkingar. Ikki alt hevur samband við hetta lógaruppskot, men vit meta tó at rætt er at hava hetta við í heildini.

1) Viðmerking til §11.
§ 11 ljóðar: Í føroyskum fjølmiðlum, undir hesum eisini talgildum miðlum og øðrum miðlum, sum venda sær til viðskiftafólk í Føroyum, er ikki loyvt at lýsa við sølu, skeinking og útflýggjan av rúsdrekka.

Vit meta at henda grein skal skrivast so, at eingin ivi er um, at ikki kann lýsast á nøkrum miðli, ið vendir sær til føroyingar. Vit meta at orðið "føroyskum" skal strikast so tað kemur at standa nakað soleiðis: "Í øllum fjølmiðlum, undir hesum eisini talgildum miðlum og øðrum miðlum, sum venda sær til viðskiftafólk í Føroyum, er ikki loyvt at lýsa við sølu, skeinking og útflýggjan av rúsdrekka"
Vit meta at um orði føroyskum verður brúkt kann hetta misskiljast sum at alt bert er galdandi fyri føroyskar miðlar og eitt nú ikki fyri Facebook.

2) Viðmerking til kapittul 2. Avleiðingar av uppskotinum 2.1.
2.1 Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur ljóðar soleiðis:
Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar avleiðingar fyri inntøkuna hjá Rúsdrekkasøluni. Tó so at tá ið framleiðarir ikki keypa vøruna gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins, vil tað, alt annað líka, merkja ein inntøkumiss fyri landið, við tað at avlopið hjá Rúsdrekkasølu Landsins møguliga verður ávirka negativt.

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

Vit hava ikki gjørt nakra meting av nakrari fíggjarligari avleiðing av hesum. Í hesum sambandið kann tó viðmerkjast, at tá framleiðarir ikki keypa vøruna gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins, vil tað, alt annað líka, merkja ein inntøkumiss fyri landið við tað at avlopið hjá Rúsdrekkasølu Landsins møguliga verður ávirka negativt. Hetta er eisini tað, ið nevnt er í

viðmerkingunum omanfyri. Hetta kann forðast fyri, við at avgjøldini verða broytt áðrenn henda lóg verður samtykt. Vit meta at avgjøldini eiga at verða samtykt skjótast gjørligt og helst áðrenn nakað annað verður samtykt, tí at tað kann verða tyngri at koma við avgjøldum aftaná. At avtaka avlopskravið og regulerað avgjøldini ger at landskassin ikki er fyri inntøkumiss óansæð hvør selir. Hesin leistur gevur eisini øllum javnbjóðis møguleikar fyri prísáseting.
Koma avgjøldini ikki í staðin fyri avlopskrav, er vandi fyri at landskassin missur inntøkur í takt við at vinningurin hjá Rúsdrekkasølu Landsins minkar.

Sjálvt um hetta lógaruppskot ikki snýr seg um avgjøld, meta vit at tað er vert at taka hædd fyri hesum.

3) Vitandi um at pant ikki er ein partur av hesum uppskotið, vilja vit allíkavæl meina at hetta eigur at verða tikið við í heildini. Sannlíkt kann teinkjast at einki pant verður lagt á summar vørur, men hesar kunnu koma í retusystemið hjá Rúsdrekkasølu Landsins og harvið kann pant verða útgoldið og annars hava eyka arbeiði við sær. Hetta kann so hava negativar avleiðingar fyri Rúsdrekkasølu Landsins. Hinuvegin, um so er at einki pant er á vøruni kann hon í ringasta føri enda í náttúruni.

Vinarliga heilsan

Rúsdrekkasøla Landsins

LM-003/2023